# Heimbygdin verður fríðkað til stevnuna



*Sólgerð Andreasen (fremst) og tvær vinkonur hennara – Durita Hansen og Anja Lamhauge – takast við at lúka Torgið í heimbygdini*

**Ungfólk arbeiða við at fríðka í bygdini, nú Fjarðastevnan verður um vikuskiftið.**
**- Her er nokk at gera, sigur 16 ára gamla Sólgerð Andreasen.**

RUDDA BYGDINA
*Orð&mynd: Snorri Brend*

**Vestmanna:** Í góðveðrinum mánamorgunin sást ein hópur av ungum gentum á Torginum til arbeiðis.

Allar vóru tær fult upptiknar við uppgávum sínum: At lúka og rudda hetta vakra plássið mitt í bygdini.

Torgið fer um vikuskiftið at hava sítt natúrliga pláss í skránni fyri Fjarðastevnuna, har fundir og møtir av ymiskum slagi skulu haldast.

Nú skulu so hesi ungu hampa og fríðka um hetta økið, sum er eitt tað fyrsta sum møtir tí vitjandi, ið ætla sær inn í bygdina. Aðrastaðni í bygdini sóust onnur ungfólk í við uppgávu.

Ein teirra sum arbeiðir her er vestmannagentan, Sólgerð Andreasen sum er við í verkætlanini "Ung í arbeiði".

- Eg ætli mær at brúka peningin til at keypa mær eina aðra fartelefon, og so ætli eg mær eisini til frisør, sigur hon, alt meðan hon lúkar rundan um vøkru planturnar.

### Mála og rudda

At rudda torgið í heimbygdini er bert ein partur av øllum tí, sum ætlanin er at náa hesar komandi dagarnar.

Ætlanin var – alt sjálvandi treytað av veðrinum – at mála ymsastaðni í bygdini.

- Vit skulu mála í barnagarðinum, og skulu eisini mála nakrar veggir við parkeringspláss, greiðir Sólgerð frá.

Mánamorgunin var hon sum nevnt í ferð við at lúka, meðan fleiri av javnaldrum hennara stríddust við at fáa eina sláimaskinu at virka.

- Tú. Kanst tú ikki hjálpa okkum at fáa henda proppin til bensinið av? Hann situr so fastur, siga tvær teirra við tíðindamannin.

Proppurin fer av beinanvegin, og løtu seinni hoyrist gangurin frá hesum handborna sláaranum.

### Slappa av

Mánadagurin var fyrsti arbeiðsdagurin hjá Sólgerð í hesi verkætlanini hjá Vestmanna kommunu.

Hon er annars von við annað arbeiði enn heima-arbeiðið frá skúlanum.

Eftir skúlatíð hevur hon m.a. arbeitt hjá bakaranum í bygdini, men nú er hann givin. Í summar hevur hon søkt onnur arbeiði, m.a. hjá Fiskavirking, Fjørðukrónni og onkra aðrastaðni.

- Men eg veit einki um nakað av hesum enn, sigur Sólgerð.

Í løtuni er tað so urtagarðsarbeiðið hjá Vestmanna kommunu sum hon og fleiri onnur ung eru upptikin av.

Tá hon er liðug við hetta, veit hon ikki rættiliga hvat hon fer at gera.

- Eg haldi, at eg fari bara at slappa av eitt sindur, sigur hon.

## Møtir úti og inni

**Samkomur:** Eingin stevna uttan andalig tiltøk. Hetta fáa gestirnir á Fjarðastevnuni eisini at sanna, tí samkomurnar í Vestmanna hava gjørt sítt til at hesin tørvurin verður nøktaður um vikuskiftið.

Missiónshúsið bjóðar hvørt kvøld til útifundir á Torginum. Dentur verður her lagdur á góðan sang. Eftir hetta verður opið hús í missiónshúsinum.

Samkoman Saron ger eisini vart við seg á stevnuni. Fríggjakvøldið og leygarkvøldið fara limir í samkomuni at hava útifundir á Torginum. Aftaná verður opið húsið við kaffi og sangi í samkomubygningi teirra.

Nevnast kann, at við gudstænastuna sunnumorgunin fer Hans J. Joensen, bispur at prædika. Somu tíð verður evangeliskt møti í Saron.

**sb.**

## Eingin list og eingin framsýning

**Mentan:** Á slíkum stevnum er vanligt at hava framsýningar av ymiskum slagi.

Men á Fjarðastevnuni verður einki slíkt tiltak.

- Vit hava roynt og roynt at fáa fólk at skipa fyri framsýningum, men hetta hevur ikki eydnast okkum á hesum sinni.

- Tíverri, mugu vit bara siga, staðfestir forkvinnan í VÍF, Jóngerð M. Nielsen.

**sb.**



*Jóngerð M. Nielsen harmast um at eingin listaframsýning verður á skránni um vikuskiftið*

## Uppboðssøla av teim "kendu"

**Myndir**: Hóast eingin listaframsýning er á skránni, so verður kortini nakað av "list" í Vestmanna hetta komandi vikuskiftið.

Eftir at steypadysturin millum VÍF og Kyndil er liðugur verður nevniliga hildin ein meksikansk uppboðssøla í miðhøllini í skúlanum.

Tað hevur nevniliga eydnast fyrireikarunum at fáa tey fýra løgtings- og landsstýrisfólkini úr Vestmanna og sjálvan borgarstjóran at mála hvør sína mynd til hetta høvið.

Kl. 21:15 verður so høvið hjá fólki at bjóða upp á myndir eftir Bárður Nielsen, Hans Paula Strøm, Heidi Petersen, Olav Enomoto og Karl Olsen.

Hetta kann uttan iva gerast ein spennandi og fjølment løta. Tað er ikki á hvørjum degi, at høvið er at keypa málningar eftir SO kend listarfólk!

**sb.**

**Interior**
v/G. Gunnbjørgsdóttir - Innanduraarkitektur

Ráðgeving innan innrætting.
Íblástur til persónligan stíl.
Vegleiðing til rætta tilfarið.
Hugskot til perfekta rúmið.
Lítil sum stór tilboð verða givin
til privat hús, handlar, skúlar,
matstovur o.m.a.

tel. 258543

Gunnbjørg Gunnbjørgsdottir